

ÁÐRENN:

Thomas hevur sethúsalán, billán og nýtslulán. Hann umhugsar at umleggja síni lán, tí fíggingarloysnin hóskar ikki til hansara tørv og ynskir. Afturgjaldstíðin er ov stutt, avdrøgini ov høg, og rentuloysnin er ótíðarhóskandi. Hann kundi hugsað sær størri rásarúm nú og so heldur goldið meiri, tá børnini eru vorðin eldri, og inntøkan er hækkað.

**Thomas Hansen**

34 ár

Stjóri í egnari fyritøku

Giftur við Eyð

Tveir synir, 1 og 13 ár

# Fantastisk kon

**Jens og Kristel Lisberg høvdu konsert í Trongisvági leygarkvøldið. Ein konsert av teim stóru, so øðrvísi, har tónleikadygd og nærleiki stóðu ovast á breddanum**

Tónleikur
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tað gjørdist veruliga ein uppliving – nærum totaluppliving, tá Jens og Kristel Lisberg leygarkvøldið høvdu konsert í Trongisvági. Við góðari manning og framúr kórkvinnum, var góðskan í hásæti.

Síðsta konsertin í hesum umfarinum, varð sagt, tí tey bæði hava havt væleydnaðar gallakonsertir síðstu 2 – 3 árini.

Og talan er um eitt øðrvísi tiltak, enn vanligt er. Troubadourkendir tónar, country, rockur og gospel. Alt frá eini ungari stjørnu, ið lýsir sum ein sól og sum hevur framúr góða rødd. Og frá einum av teim goðu, gomlu, ið so hjartaliga meinar hvørt orð og hvønn tóna, at tá hann við djúpu, kláru røddini borðreiðir við tí besta frá øllum árunum á føroyska tónleikapallinum, so kann tað ikki gerast annað enn inniligt og gott.

Sangur, smásøgur og skemt í blandi við góðum tónleiki og sambandi við áhoyrararnar. Hetta er ein góð uppskrift, ið eisini riggaði leygarkvøldið.

Longri umrøða av konsertini verður í blaðnum í morgin. Myndir eru at síggja á Portalinum undir "tema".



*Jens og Kristel. Hon lýsir sum ein sól og sy*
*frá øllum árunum á føroyska tónleikapall*
*morgin*

# Teitur nummar 9 á sølulistanum

Fløgan Stay Under The Stars hjá Teitur hevur fingið sera góð ummæli bæði í Føroyum og í Danmark, og nú sæðst hetta aftur í sølutølunum. Fløgan, ið liggur ovast á sølulistanum hjá 3'aranum liggur hesa vikuna nummar 9 á almanna danska sølulistanum.

Teitur liggur millum Bruce Springsteen og Kelly Clarkson á listanum, ið nýggja fløgan hjá Thomas Koppel Improvisationer for Klaver eigur ovasta plássið á. Listin er bygdur á sølutøl frá flestu sølustøðum, ið selja fløgur í Danmark, t.d. Fona, StereoStudio, Merlin, GUF,